Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hervør Pálsdóttir, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Istanbul sáttmálin og harðskapur móti kvinnum

Spurningar:

1. Verður arbeitt við at seta Istanbul sáttmálan í gildi fyri Føroyar?
2. Verður arbeitt við átøkum fyri at basa harðskapi móti kvinnum?
3. Hvørja støðu hevur løgmaður til spurningin um sjálvstøðugt at kriminalisera sálarligan harðskap?

Viðmerkingar:
Hagtølini hjá Kvinnuhúsinum um fráboðanir um harðskap eru nógv økt seinastu árini. Tað sæst eisini greitt í hagtølunum, at nógvar kvinnur eru fyri sálarligum harðskapi. Kvinnuhúsið fekk í 2020 623 fráboðanir um sálarligan harðskap.

Istanbul sáttmálin er ein altjóða sáttmáli, hvørs endamál er at fyribyrgja og basa harðskapi móti kvinnum og harðskapi í heimunum. Istanbul sáttmálin fevnir breitt og fevnir um øll sløg av harðskapi. Istanbul sáttmálin er tó ikki settur í gildi fyri Føroyar. CEDAW sáttmálin er samtyktur at galda fyri Føroyar, og í 2021 heitti CEDAW á Føroyar at seta Istanbul sáttmálan í gildi.

Hesin fyrispurningurin verður settur fyri at fáa greiðu á, um arbeitt verður við átøkum at basa harðskapi móti kvinnum, um ætlanin er at seta Istanbul sáttmálan í gildi fyri Føroyar, og um løgmaður ætlar at leggja uppskot fyri Løgtingið at kriminalisera sálarligan harðskap.

Á Løgtingi, 25. mai 2022

Hervør Pálsdóttir